# Miðlamjarr

Í dag er síðsti dagurin
higartil í mínum lívi.
***Kvinna, 45 ár***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein / Inna Törnroos

*Arbeiðs-umstøðurnar hava verið ótolandi.*

Uppsagdi hjálparvenjarin Jóannes Jakobsen um starvið í HB, har hann sigur, at nevndarlimir hava lagt seg út í arbeiðið hjá venjarunum. (Dimmalætting)



Ótrúliga stuttligt at dyrka nostalgi'ina frá Landskrona. Eitt er, at avrikið var fantastiskt, og í sjálvum sær nóg mikið til eina framúr sending. Men tá tað verður framborið so fantastiska væl, sum bara Merkistein kann gera tað, so fær tað ikki verið betri.
***Maður, 35 ár***

*Megan gav mær størri sjálvsálit*

37 ára gamli fyrrverandi Beverly Hills-sjónleikarin Brian Austin Green tosar um unnustu sína, 24 ára gomlu Megan Fox. (The Sun)





*Tað er stórt at síggja húkin, Tað minnir meg um, tá eg var í New York og sá verðins størstu tøjklemmu og verðins største tummil.*

Listamaðurin Amariel Norðoy um húkin í rundkoyringini í Klaksvík (Norðlýsið)



*Lærarafelagið fer at hvessa tónan*

Herálvur Jacobsen, nýggjur formaður í Lærarafelagnum, um fólkaskúlan og sparingar (KvF)



*At hava málfrøðingar, ið gera nýggj orð og geva bøkur út av ymsum slagi, er sjálvsagt gangligt fyri føroyska málið, men er ikki tað, sum flytur ta stóru fjøldina, ið veksur til við útlendskum máli meginpartin av gerandisdegnum.*

Annika Mittún Jacobsen, Kringvarpsstjóri, um málsligt arbeiði



*Reiðiligheitin fer av einum politikara, sum heldur eina so mergjaða røðu, tá ið hon heiðrar síni listafólk, og í næstu løtu strikar somu virðislønir, tí at hann hevur fingið harraboð um útreiðsluneutralitet.*

Oddfríður Marni Rasmussen, formaður í Listafólkasambandi Føroya, um skerjinar av almennum virðislønum

»Vegurin til Gud« stóð tað á einum lepa í elevatorinum – og eg sum bara helt, at hann fór til 9 hædd.
***Kvinna, 40 ár***

Var á fótum klokkan 7 í morgun fyri at náa ein fyrilestur í familjurætti. So sótu vit har. 250 seriøs lesandi í einum høli til 225, so nøkur máttu sita í vindeygakarminum, men hvat hendi. Ongin professari klokkan 8:15 og heldur ongin klokkan 8:30. Var tað fótbóltur vunnu vit 3-0, men eg kendi meg ikki sum ein vinnara, tá eg hugsaði um, at næsti fyrilestur ikki er fyrr enn klokkan 15.
***Maður, 22 ár***